# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Føðingar

4. juni fingu Kristvør og Piddi Jacobsen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3550 gr.

7. juni fingu Karin S. Tausen og Oliver Debes, Vági, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3670 gr.

11. juni fingu Gudrun Christiansen og Óli Jøkladal, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3730 gr.

11. juni fingu Heidi Simonsen, Tórshavn, og Jan Gardar, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3350 gr.

11. juni fingu Erna og Asbjørn Østerø, Eiði, ein son. Hann var 58 cm langur og vigaði 4300 gr.

12. juni fingu Signe Skaaning og Hans Jóhann Sørensen, Leynum, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 3600 gr.

12. juni fingu Lív Fjallsbak og Ivan Niclasen, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3200 gr.

13. juni fingu Elin Sigvardsen og Jákup Petur Bærentsen, Keypmannahavn, tveir synir. Teir vigaðu 2500 og 2800 gr, og vóru 48 cm langir.

13. juni fingu Marna Zachariasen og Hans Terji Joensen, Miðvági, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4300 gr.

13. juni fingu Magna S. Juul og Hjalti Lundsbjerg, Fuglafirði, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3400 gr.

14. juni fingu Heidi Zachariasen og Marcel Felicia, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm lang og vigaði 3825 gr.

14. juni fingu Barbara J. Hansen og Finnbogi Berg, Saltangará, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3150 gr.

15. juni fingu Martha Simonsen og Eyðfinn Sigurstein, Tórshavn, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3200 gr.

16. juni fingu Elisabeth Myrdal Hentze og Ingi Vestergaard, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3200 gr.

## Andlát

10. juni
Katrina Johansen, inni í Gerði Strendur, 84 ár.
Ata Knudsen av Glyvrum, 91 ár.

11. juni
Gunnhild Samuelsen, Eiði, 83 ár.
Olivar Vang, ættaður úr Havn, búsitandi í Silkeborg, 55 ár.
Ásmund Petersen, fyrr búsitandi eitt skifti á Landavegnum í Havn, andaðist í Haderslev, 77 ár.

12. juni
Marita Poulsen, Havn, 49 ár.

13. juni
Kristina Madsen, Skálavík, 93 ár.

15. juni
Frederik Eidesgaard, Eiði, Frederik hjá Lorentzu, 93 ár.

## Erling Poulsen 80 ár!

80 ár og vit teg heiðra
kundi ynskt tær meira
Omman í huganum er
hon tær eisini alla lukku ber

Eg tykkum vil siga frá
um hvussu tað var tá
Vit sum abbabørn smá
tú okkum nógv var hjá

Tú okkum søgur fortelur
ja, tú tær eisini selur
Mangt í millum himmal og jørð
ongantíð hettar tó okkum ger ør

Bert tygor hava tað flott
svevur abbon gott
Soleiðis tú altíð sigur
títt motto her skriva niður

Tú okkum nógva gleði ber
bert tíðin alt ov skjótt frá okkum fer
Abba- og langabbabørn eru fleir
kærleika vit tær bera meir

Tú nógv meg hevur lært
í hjartanum eg havi kært
Tað langt meg hevur ført
sum takk eg tær hettar havi gjørt



Hjartaliga tillukku abbon
ynskir

**Toppan**

## Góði abbon

Nú tú rundan dag hevur
vilja vit takka fyri alt tú gevur
Kærleika og umsorgan nógva
so alt í okkum kann grógva
Tú eina søgu altíð eigur
og okkum gjøgnum hulduheim leiður
Sum børn vit mangan hoyrdi
tá vit biltúr um oynna koyrdi
Um slekt og ættarbond
her heima og á sløttu strond
Títt minnið er klárt og reint
um farnu tíð tú rakar beint
Ein tanka til okkum tú altíð hevur
men ikki tað stóra tú krevur

Bara vit hava tað gott og eru glað
so er abbon í góðum lag
Tú tína góðu konu saknar
har hjálptu ongir læknar
Lagnan vildi tað so
og Jesuspápin sendi boð
Hann í himli hana skuldi læna
okkara ommu so væna
Hon tikin bleiv frá tær
sum hon hevði so kær
Tú veit tú aftur møta henni skal
tín sakn hann kenna vit so væl
Men teg vit hava enn
og glað vit kunna siga øll ísenn
Takk fyri abba so góðan

vit elska síggja hann fróðan
So saman vit sita øll
og hyggja útyvir fjøll
Á Viðareiði eru samla
og práta um alt tað gamla
Tillukku vit ynskja tær
nú barnaeyga okkar sær
At abbi okkara eldri er
og tíðin gongur við ferð
Tó abbi okkar tann sami er
Tillukku frá

**Jóngerð og Rúna**

Malja Danielsen og Joan Jørgensen, Sørvágur:

## Prógv sum kokkar á tekniska skúlanum í Ålborg



*Malja Danielsen og Joan Jørgensen. Myndin er tikin á Poul Michelsen heilsølu í Havn. Frá 20. juni verður framleiðslan av teimum væl umtóktu Sandwich`unum flutt til Hotel Vágar.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Á tekniska skúlanum í Ålborg hava Malja Danielsen og Joan Jørgensen úr Sørvági fingið prógv sum kokkar.
Báðar arbeiða tær á Hotel Vágum, og kundu tær fyrr í ár halda sín 25 ára starvsdag har.
Joan Jørgensen fekk "Horesta meistarakrússið" sum bert verður givið fyri sera gott avrik. Hon stóð royndina við rós. Malja Danielsen fekk "flidsdiplom" fyri gott avrik.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Erling Poulsen 80 ár



Sunnudagin 20. juni fyllur Erling Poulsen í Havn fyrrverandi lærari 80 ár.
Erling er vágbingur, sonur Josefinu, fødd Thomassen úr Vági og Mortan Poulsen úr Víkabyrgi.
Erling tók 1. stig á Jonstrup Seminarium í 1951 og tók 2. stig og fekk lærara-prógv á Føroya Lærara-skúla í 1952.
Eftir lokna útbúgving fór hann aftur til Vágs at undirvísa.
Hann var lærari í Vági í 36 ár, frá 1952 til 1988, tá hann fór úr starvi. Hann var deknur í Vágs Kirkju frá 1967-78.
Erling hevur búð í Havn síðan 1989.
Í Havnini hevur hann verið aktivur pensiónistur. Hann hevur millum annað hjálpt til á Handilsskúlanum og Maskinskúlanum, har hann hevur sitið vakt. Eisini hevur hann verið glaður fyri at gingið á Fornminnisavninum og sagt frá um gamlar fornlutir.
Sum rithøvundur hevur hann verið ágrítin, og hevur hann fyri stuttum givið út bók nr. 12.
Erling hevur eisini skrivað søgur og frásagnir til "Mína jólabók" og "Varðan" . Hann hevur eisini týtt barnabøkur og týtt frásøgumyndir til Útvarp Føroya.
Erling var giftur við Lydiu, fødd Langgaard úr Leirvík. Hon doyði fyri tveimum árum síðani eftir stutta sjúkralegu.
Tey eiga børnini Bjørghild, ið er gift við Martin, og Mortan ið er giftur við Sólgerð. Erling eigur 6 abbabørn og 3 langabbabørn.
Føðingardagurin verður hildin við móttøku á Hotel Hafnia sunnudagin frá kl. 15.00 til 18.00

## Vibeke Larsen 60 ár



Sunnudagin 20. juni fyllir Vibeke Larsen, fyrrverandi ríkisumboðsmaður, 60 ár.
Vibeke er fødd í Tønder 20. juni 1944, hon varð útbúgvin løgfrøðingur í 1972.
Hon var skrivari í danska sosialmálaráðnum frá 1972-73, og skrivari og fulltrúi í Den sociale Ankestyrelse frá 1973-76.
Hon var fulltrúi í sosialu umsitingini í Vestsjællands Amtskommune frá 1976-78 og varaskrivstovustjóri frá 1978-89.
Frá 1989 til 1995 var hon skrivstovustjóri í Vestsjællands Amt.
Í 1995 kom hon til Føroya sum ríkisumboðsmaður. Hetta starv rókti hon til 2001, tá hon fór til Danmarkar aftur.

## Pedda Jacobsen í Sørvági fyllir 75 ár

Peter A. Jacobsen, eisini kallaður Pedda í Sørvági, fyllur 75 ár í dag. Pedda varð føddur í árinum 1929.
Hann er sonur til Jesar og Dagmar Jacobsen. Pedda er pápi okkara, so herfrá skriva vit pápi.
Øll ið kenna pápa hava mangan hoyrt hann siga frá tíðini tá eingilskir hermenn vóru í Sørvági. Pápi var smádrongur tá og lærdi hann seg tá bæði at dáma eingilska sjokulátu og at tosa enskt. Enn í dag er pápi stak glaður fyri alt enskt og rósar eingilsmonnum so skjótt høvi bíðst.
Pápi fór til skips fyri fyrstu ferð í 1946 við sluppini "Thor". Hann hevur síðani siglt við m.a. rækjutrolarum, ísfiskatrolarum og farmaskipum. Hann var eisini nógv ár í Grønlandi, har hann róði út saman við pápanum Jesari, og beiggjum sínum.
1960 giftist pápi vid mammu okkara– Lulu Jacobsen. Saman fingu tey fýra børn, Jan 1960, Wenningsted 1964, Innu 1971 og Andreu 1976. Eivind Jacobsen, sonur Innu og Evald búði eisini í heiminum í nógv ár.
Pápi misti mammu sína tá hann var 11 ár. Louisa Rubeksen sum var systkinabarn og gomul genta, hevði búð í heiminum í nógv ár tá, og hon tók sær av pápa og systkum hansara.
Pápi hevur búð í Sørvági alt sítt lív, men siglt runt allan knøttin við ymiskum skipum. Báðir synirnir hava gingið í fótasporunum hjá pápanum, men báðir hava teir fingið sær útbúgving sum yvirmenn. Døturnar hava nomið sær útbúgving sum blaðkvinna og ergoterapeut.
Í frítíðini dámar pápa væl at fáast við havan og at velta bæði eplir, gularøtur, røtur og annað.
Honum hevur eisini altíð duga og dámt stak væl at tosa, so ikki eru tað mong ferðafólkini ið ganga á Stengravegnum, sum ikki verða steðgaði fyri at práta eina løtu. Á onkran løgnan hátt eydnast tað altíð pápa at gera seg forstaddan. Hann fortelur mangan frá, at í dag havi eg tosað við ein fransmann, og spyr tú hann hvat mál teir tosaðu verður svarið ofta "jaaaa...tað var ein blandingur av enskum og fronskum" og sama ger um tað eru italiumenn ella spaniólar.
Síðan pápi bleiv pensioneraður hevur hann m.a. siglt við ferðafólki út á Sørvágsfjørð og út til Tindhólm. Hetta hevur dámt honum stak væl og nógv eru brøvini



og postkortini frá nøgdum ferðafólki, sum koma um jóltiðir og takka fyri blíðsemi.
Vit vilja við hesum orðum ynskja pápa, verpápa og abba okkara hjartaliga tillukku á 75- ára degnum og ynskja honum Harrans signing framyvir.
Dagurin verður hildin saman við familjuni á Álandi.

**Familjan**

## Dagurin

**19. juni. Gervasius**, deyður umleið ár 300. Gervasius og bróðurin Protasius vórðu tiknir av døgum í Milano.

**20. juni. Sylverius**, deyður ár 537. Hann var sonur pávans Hormisades og gjørdist seinni sjálvur pávi, men av politiskum grundum varð hann skjótt frákoyrdur.
Navnið merkir *skógarbúgvi*.

**21. juni. Longsti dagur. Sólstøður**, tá ið sólin stendur hægst á luftini um miðdagin. Tað kann vera 21. ella 22. juni.
Dagurin eitur eisini **Albanus**. Hann var úr Onglandi, og gjørdist biskupur í Mainz, har hann varð hálshøgdur, tá ið vandalar um ár 400 søktu at býnum.

## 80 ár

Judith P. J. Petersen, á Steig, Sandavági, fyllir 80 ár mánadagin 21. juni. Hon verður burturstødd.

Í morgin, 20. juni, fyllir Erling Poulsen, fyrrverandi lærari, 80 ár. Móttøka verður á Hotel Hafnia sunnudagin kl. 15–18.00.

## Prógv

Maria Kristiansdóttir úr Kollafirði hevur tann 11. juni lokið endaligt prógv sum klæðskeri og formgevi innan damu- og harraklæði á Iónskóla Íslands í Reykjavík.

## Brúdleyp

Í dag, 19. juni, kl. 14.30 giftast í Christianskirkjuni, Daniella Justesen, Hvannasund, og Hans Kristian Johannesen, Skáli. Veitslan verður fyri innbodnum í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00.
Brúðarhús verður 20. juni í heiminum hjá Sigbjørg og Kenneth Justesen, Hvannasund, har øll eru hjartaliga vælkomin.

Í dag, 19. juni, giftast á Nesi, Mildrið Eivindsdóttir úr Norðragøtu og Emil Ludvig av Tvøroyri. Opið hús verður í Kvinnuhúsunum á Glyvrum frá kl. 19.30, har øll eru hjartaliga vælkomin.

Í dag, 19. juni, giftast Atchara Noiweng og Ólavur Emil Olsen, Vági. Dagurin verður hildin fyri innbodnum í Bygdarhúsinum í Lopra.



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost:
**post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til:
**Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn**
**merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin